# Opinleiki altavgerandi fyri framtíðina



*Tá oljuráðstevnan varð liðug í Norðurlandahúsinum seinasta mikudag handaði Amerada Hess landsstýrismanninum í oljumálum, Eyðun Elttør borikrúnuna, sum Sovereign Explorer brúkti, tá teir raktu við gass og olju á landgrunninum*

*Mynd Jan Müller*



*Áhugavert kjak á Oljuráðstevnuni*

**– Tað ræður um at hava bæði bein á jørðini og ikki fara upp frá, nú tað frættist, at olja er funnin, tí vit vita enn ikki, um hetta verður til nakað sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, eftir eina væleydnaða oljuráðstevnu**

EFTIRMETING
*Jan Müller*

Eyðun Elttør, landsstýrismaður er sera fegin um oljuráðstevnuna, sum var í Norðurlandahúsinum í farnu viku og heldur, at tiltakið var sera væl fyriskipað. – Nógv áhugavert kom fram á ráðstevnuni, og bara tað at fólk, sum hava tilknýti til eina komandi oljuvinnu, kunnu hittast at viðgera spurningar av ymsum slag, hevur so ómetaliga nógv at siga.

– Eg ivist ikki í, at tann opinleiki, sum kom til sjóndar á ráðstevnuni, fer at gagna allari oljutilgondini í framtíðini. Vit hava brúk fyri einum framhaldandi dialogi, sohvørt sum menningin tekur dyk á seg.

Eyðun Elttør heldur tað vera gott at fáa nógvar ymsar áskoðanir fram. – At fólk, sum hava ymisk áhugamál, tora at stíga fram og siga sína hjartans meining er gott. So mugu vit so hvør sær og ikki minst bæði vinnan her, myndugleikarnir og útlendsku feløgini meta um tann kritikk, sum kemur fram. Er hann rættur, so mugu vit øll royna at bøta um viðurskiftini, er hann misvísandi ella yvirmettur, so mugu vit eisini taka tað við í metingarnar.

– Endamálið við slíkari ráðstevnu er fyrst og fremst at hava eina eftirmeting av tí, sum er farið fram, men tað hevur so ikki minni at siga at stinga út í kortið, hvat vit vilja og kunnu í framtíðini.

Eins umráðandi tað er, at vit hava verið fyrivarin á umhvørvisøkinum og hava roynt at tikið øll fyrivarni og lagt útviklingin til rættis frá byrjan – er tað umráðandi, at vit fáa gjørt tær neyðugu árinskanningarnar á tí sosiala og samfelagsliga økinum. Eyðun Elttør heldur tó ikki, at vit eru ov sein á sjóvarfallinum her.

### Bæði bein á jørðini

Hann heldur annars, at tað ræður um at hava bæði bein á jørðini og ikki fara upp frá, nú tað frættist, at olja er funnin, tí vit vita enn ikki, um hetta verður til nakað.

– Enn hava vit bert stigið nøkur fá fet inn í hesa ókendu oljuverðina. Vit vita ikki, hvat liggur fyri framman. Men finna vit so nógv av olju, at tað kann løna seg at framleiða hana, so vita vit eisini, at hetta kann verða ein so mikið stór avbjóðing, at vit mugu taka hana í størsta álvara. Og har koma árinskanningar so sanniliga eisini inn í myndina.



*Umboð fyri tey oljufeløgini í The Faroes Partnership samtakinum saman við tí nú søguligu borikrúnuni, sum kom fram á olju og gass í undirgrundini.*

*Mynd Jan Müller*



# Órímiligt gjald skal viðgerast

**– Tað kann tykjast órímiligt, at foreldur mugu gjalda fyri eina tænastu, sum tey ikki fáa, og vit ætla at viðgera brúkaragjaldið fyri barnaansingina, tá verkfallið er av, sigur borgarstjórin í Klaksvík**

BARNAANSING
*Eyðun Klakstein*



*– Tað er óheppið, at foreldur gjalda fyri eina tænastu, sum tey ikki fáa, men áðrenn vit kunnu siga nakað meira um hetta, mugu vit viðgera málið. Tað fara vit at gera, so skjótt sum verkfallið er av, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Klaksvík:** Klaksvíkar kommuna fer at viðgera málið um brúkaragjaldið til dagstovnarnar í kommununi, tá verkfallið hjá pedagogunum er av.

Pedagogarnir hava verið í verkfalli í tvær vikur, og hesa tíðina hava tey foreldur, sum vanliga hava børn síni á dagstovnum, verið noydd at funnið aðrar mátar at fáa børnini ansað, meðan tey hava verið til arbeiðis.

Hetta hevur fingið foreldrini at spyrja, um tey skulu gjalda fyri dagstovnaplássini, hóast tey ikki hava brúkt tey farnu tvær vikurnar.

– Tað kann tykjast órímiligt, at foreldur mugu gjalda fyri eina tænastu, sum tey ikki fáa, og vit ætla at viðgera brúkaragjaldið, tá verkfallið er av, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

### Óheppið

Hann vil ikki lova, at foreldrini fáa avsláttur í gjaldinum, sum tey gjalda fyri at hava pláss á dagstovni, men málið skal viðgerast væl og virðiliga.

Klaksvíkar kommuna sparir 50.000 krónur um dagin, nú verkfall er, og higartil hevur tað givið eina sparing upp á meira enn eina hálva millión krónur.

– Tað er óheppið, at foreldur gjalda fyri eina tænastu, sum tey ikki fáa, men áðrenn vit kunnu siga nakað meira um hetta, mugu vit viðgera málið. Tað fara vit at gera, so skjótt sum verkfallið er av, sigur Steinbjørn Jacobsen.

### Hækking

Men hóast foreldur í Klaksvík sleppa undan einum parti av gjaldinum, um kommunan ger av, at tey skulu hava avsláttur orsaka av verkfallinum, so kunnu tey vænta at koma at gjalda meira í framtíðini.

Orsøkin er, at dagrøktarar eru farnir upp í løn, og tað sama verður við pedagogunum. Foreldrini gjalda 30 prosent av tí, sum tað kostar at reka barnaansingina, og tað tykist púra greitt, at brúkaragjaldið fer upp í næstum.

– Vit vita ikki enn, hvussu nógv hetta gjaldið fer upp fyri teir ymsu tænasturnar, men við vaksandi útreiðslunum á økinum, so slepst ikki undan, at brúkaragjaldið má upp, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Lønarhækkingin hjá dagrøktarunum kom í gildi frá 1. mars, og tað sama verður hjá pedagogunum, men hóast hetta er brúkaragjaldið ikki farið upp hesa tíðina, so har hava foreldrini eisini spart pengar.

# Gera nýggjan útibarnagarð



*40 ansingarpláss afturat verða tøk, tá nýggjur útibarnagarður fer at virka í Klaksvík móti summri*

**Klaksvíkar kommuna mátti broyta uppskotið til fíggjarætlan, tí útreiðslunar til barnaansingina økjast støðugt**

BARNAANSING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Klaksvíkar kommuna fyrireikar í løtuni ein nýggjan útibarnagarð. Hesin skal halda til Úti í Grøv, har ein annar útibarnagarður eisini er.

Nýggi útibarnagarðurin fer at hava pláss fyri 40 børnum, og tá kemur samlaða talið á dagstovnaplássum upp á 410 pláss.

Klaksvíkar kommuna hevur seinnu árini gjørt alt meira við barnaansingarøkið, og tað merkir eisini, at ein trivaligur partur av útreiðslunum hjá kommununi eru til barnaansingina.

Komandi ár eru útreiðslurnar til hetta økið 17 milliónir krónur.

### Meira enn ætla

Neyðugt var at broyta fíggjarætlanina, sum býráðið samtykti í september. Orsøkin var, at 1,2 milliónir krónur máttu setast av afturat til barnaansingina, nú lønarútreiðslurnar vaksa.

Hetta gjørdi, at skava varð av ymiskum øðrum pørtum av fíggjarætlanini.

– Tað er stórur tørvur á dagstovnaplássum, og kommunan hevur útvega nógv pláss afturat seinastu árini. Nýggjur útibarnagarður skal takast í brúk móti summri, og møguliga verður eisini okkurt annað gjørt fyri at fáa fleiri pláss, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

### Gera høli í stand

Í ár er millum annað nýggjur frítíðarskúli tikin í brúk í KÍ-høllini, og tað vaks um talið av plássum. Í løtuni eru 370 ansingarpláss í kommununi, og tey vaksa upp í 410, tá nýggi útibarnagarðurin verður tikin í brúk.

Nýggi útbarnagarðurin skal halda til í hølum, sum Ferðavinnan í Norðoyggjum eigur. Klaksvíkar kommuna leigar hesi hølini Úti í Grøv, og nú verða tey gjørd í stand, so tey kunnu hýsa børnunum.

– Tá hesin útibarnagarðurin er farin at virka er spurningurin, hvat annað vit skulu gera fyri at fáa fleiri pláss. Vit skulu eisini hugsa um pengar, og í løtuni fer ein stór upphædd av fíggjarætlanin til barnaansingina, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

# Biografur aftur í Klaksvík



*Jógvan Eliasen kann mikukvøldið bjóða norðoygingum aftur til filmssýningar í Atlantis.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Mikukvøldið verður filmur aftur sýndur í Atlantis í Klaksvík. Framyvir verða filmssýningar fastur partur av virkseminum í mentanarhúsinum**

FILMUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Mikukvøldið verður hvíta tjaldið í mentanarhúsinum Altantis í Klaksvík aftur tikið í nýtslu.

Á skránni er amerikanski filmurin Bandits, og hetta verður fyrstu ferð í eini tvey ár, at filmur av hesum slagnum verður sýndur í Altantis.

Tá húsið lat upp eftir stóru umvælingina vóru filmssýningar í Atlantis, men hetta datt niður fyri, tá húsið sigldi seg fast í fíggjarligum trupulleikum.

Nú eru umstøðurnar hjá húsinum broyttar, og tað verður ein fegin leiðari fyri Atlantis, sum mikukvøldið kann bjóða norðoyingum aftur í biograf.

### Fimm kvøld um vikuna

Jógvan Eliasen sigur, at teir hava gjørt avtalu um samstarv við Havnar Bio, sum fær allar teir nýggjastu filmarnar.

– Avtalan kemur í gildi frá nýggjárinum, men vit fara at sýna nakrar filmar í desember eisini, sigur hann.

Biografvikan í Atlantis verður frá mikukvøldið til sunnukvøld, og sýningar verða hvørt kvøld. Ætlanin er at hava ein film um vikuna, men onkuntíð verða tað tveir í somu viku. Tað liggur fast, at filmarnir Bandits, The Score og teknifilmurin Atlantis verða sýnur í desember. Fyrst í komandi ári kemur Harry Potter til Klaksvíkar.

Fyrsta sýningin verður nú mikukvøldið. Nógv virksemi er í Altantis, tí Klaksvíkar Sjónleikarfelag spælir jólasjónleik, og tí verða filmssýningarnar hesa vikuna aftaná klokkan 22.00.